# Musikkskúla Miðnám

**Endamál**

1. At næmingarnir náa eitt spælitekniskt og listarligt støði, sum svarar til upptøkukrøvini til konservatorium ella til annan líknandi hægri tónlistalærustovn. Undirvísingin kan í ein vissan mun lagast til upptøkukrøvini til ein ávísan tónlistalærustovn.
2. At menna førleikan hjá næmingunum at arbeiða sjálvstøðugt og at spæla á teirra ljóðføri við ein persónligum framburði á einum stílistiskt breiðum grundarlagi.

## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

Umsøkjarin spælir 2 sjálvvald stykkir. Kann vera við ella uttan bólki, ella backing track. Eitt av stykkinum skal innihalda improvisatión.

**Prima vista – secunda vista**

Prima vista: Lætt stykkið ið stigvíst verður torførari, verður útflýggja til royndina. Akkordskema.

**Tónastigar o.a.**

Tónastigar: dur- og mollstigar við upp til 2 forteknum, tvær oktavir upp og niður. Trýklangir í øllum umvendingum útfrá somu tónastigum.

**Rútmisk og melodisk imitatión**

**Gehør**

Improvisera solo yvir lættan akkordgang, ið stigvíst verður verri

# 1. ársroynd

**Tónleikaverk**

Næmingurin hevur eina framførslu á 10 minuttir, við sjálvvaldum tónleiki. Skal variera í huglagi. Improviserast skal yvir akkordgang, ið svarar til ein léttan jazz standard. Eisini skal eitt innlært stykkið vera ein partur av konsertini.

Í minsta lagi ein triðingur av framførsluni skal vera við rútmubólki.

***Viðm. Teknisk roynd verður hildin seperat***

**Tónastigar o.a.**

Kirkjutónastigar. Melodisk og harmonisk moll. Heiltóna skali. Allir tónastigar verða spældir 2 oktavir upp og niður. Næmingurin velur sjálvur um hann vil spæla hendurnar hvør sær ella saman.

**Teknisk etuda**

Næmingurin velur eina tekniska etudu og skal duga hana í minst 3 tónaartum.

**Prima vista – secunda vista**

Prima vista ella secunda vista

**Akkordir**

Næmingurin fær eitt ókent akkordark og verður biðin um at spæla akkordirnar frá blaðnum. Síðani verður improvisera yvir akkordirnar.

## 2. ársroynd

**Tónleikaverk**

Næmingurin hevur eina framførslu á 20 minuttir við sjálvvaldum tónleiki. Skal variera í huglagi. Skal innihalda improvisatión yvir akkordgang, ið svarar til ein miðal til torføran jazz standard, men noyðist ikki at vera ein jazz standard. Eisin skal eitt innlært stykkið vera partur av konsertini.

Í minsta lagi ein triðingur av framførsluni skal vera við rútmubólki.

***Viðm. Teknisk roynd verður hildin seperat***

**Tónastigar o.a.**

Kirkjutónastigar. Melodisk og harmonisk moll. Heiltóna skali. Heiltóna og 8 tónaskalar. Allir tónastigar verða spældir 2 oktavir upp og niður. Næmingurin velur sjálvur um hann vil spæla hendurnar hvør sær ella saman.

**Teknisk etuda**

Næmingurin velur eina tekniska etudu og skal duga hana í minst 7 tónaartum.

**Prima vista – secunda vista**

Prima vista ella secunda vista

**Akkordir**

Næmingurin fær eitt ókent akkordark og verður biðin um at spæla akkordirnar frá blaðnum. Síðani verður improvisera yvir akkordirnar.

## 3. ársroynd

### Tónleikaverk

Næmingurin hevur eina framførslu á 25 minuttir við sjálvvaldum tónleiki. Skal variera í huglagi. Skal innihalda improvisatión yvir akkordgang, ið svarar til ein torføran jazz standard, men noyðist ikki at vera ein jazz standard. Eisin skal eitt innlært stykkið vera partur av konsertini.

Í minsta lagi ein triðingur av framførsluni skal vera við rútmubólki.

***Viðm. Teknisk roynd verður hildin seperat***

### Tónastigar o.a.

Kirkjutónastigar. Melodisk og harmonisk moll. Heiltóna skali. Heiltóna og 8 tónaskalar. Allir tónastigar verða spældir 2 oktavir upp og niður. Næmingurin velur sjálvur um hann vil spæla hendurnar hvør sær ella saman.

### Teknisk etuda

Næmingurin velur eina tekniska etudu og skal duga hana í minst 12 tónaartum

### Prima vista

Prima vista ella secunda vista

### Akkordir

Næmingurin fær eitt ókent akkordark og verður biðin um at spæla akkordirnar frá blaðnum. Síðani verður improvisera yvir akkordirnar.